P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

Bókhald

Fyri Smyril Line verður søkt eftir einum fólki til at arbeiða í bókhaldinum.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góð samstarvsevnir, men má eisini kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðan kunnleika til bókhald.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt, og umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. mai kl. 8.

RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30 — P/f nr. 267
FO-110 Tórshavn — e-mail:
Tlf. (+298) 311017 — rasmussen @rasmussen.fo
Fax (+298) 311018 — Http://www.rasmussen.fo

Motorpassara-útbúgving

Tekniski Skúlin í Klaksvík

Treytað av nóg stórari luttøku byrjar undirvísingin 6. august 2001.

Umsøkjarar við viðkomandi yrkisútbúgving kunnu byrja seinni, 3. september.

Skeiðið er liðugt 21. desember 2001.

Treytirnar fyri upptøku eru:
- at ein hevur fylt 18 ár og annahvørt
- hevur staðið yrkisskeið á góðkendum sjóvinnuskúla ella
- hevur havt maskintænastu við fiski- ella farmaskipi á 20 tons ella meira í 12 mánaðir.

Meiri fæst at vita um m.a. innivist og stuðulsmøguleikar á telefon nr. 456311.

Skrivlig umsókn skal sendast Tekniska Skúla í Klaksvík, Postboks 20, 700 Klaksvík í seinasta lagi 15. juli 2001.

Tekniski Skúlin í Klaksvík
Telefon nr. 45 63 11 Telefax nr. 45 73 11

Uppsetan og skipan av barrum

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilikt

Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820

Mentamálastýrð

Stjóri til Sjónvarp Føroya

Starvið:
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum stjóri í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Mentamálastýrinum.

Høvuðsuppgávurnar hjá Sjónvarpi Føroya eru m.a.:
- Mótvegis borgarunum at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald
- Í programmvirkseminum at leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi og sakliga og óhefta upplýsing
- At veita eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av stovninum. Stjórin setir starvsfólk og loysir fólk úr starvi, og stjórin hevur fyristinginarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum mótvegis landsstýrismanninum.

Sjónvarp Føroya og alt fjølmiðlaøkið stendur yvir fyri stórum broytingum og avbjóðingum, og tí er umráðandi, at stjórin megnar at fáa stovnin at ríða á aldukambinum.

Førleikakrøv
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava
- Útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Evni at sameina tað mennandi og tað fíggjarliga
- Kunnleika til føroyska mentan og føroyskt mentanarlív
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við aðrar stovnar o.o.
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Evni at menna SvF til ein týðandi mentanarstovn

Vit bjóða:
Sjónvarp Føroya mennist alsamt, og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti og samstarvi inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá Tænastumannafelagi Landsins, tó uttan at vera eitt tænstumannastarv. Harumframt verður veitt eftirlønargjald uppá 15%. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um. Tann setti skal kunna góðtaka broytingar í starvinum orsakaðav møguligum komandi bygnaðarbroytingum.

Umsókn
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálastýrð
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
tlf. 35 50 50, faks 35 50 55, t-postur: mms@mms.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. juni 2001. Starvið verður sett frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra, ella Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra í Mentamálastýrinum, á tlf. 35 50 50.

Mentamálastýrið *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
Sjónvarp Føroya *er, sum nú er, býtt uppí 5 deildir. Í Sjónvarpi Føroya starvast 50 fólk. Rakstrarætlan Sjónvarpsins er uml. 23,5 mió. kr. fyri fíggjarárið 2001.*

Ekspeditrisa

søkist at byrja skjótast til ber.

Bakarríið hjá Símun

Tlf. 456424 ella 455032

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Aðalfundur í Heilafelagnum

Ársaðalfundur verður í MBF húsinum, Landavegur 10, Tórshavn, leygardagin 9. juni 2001 kl. 15.00.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Nevndin

HEILAFELAGIÐ
Felagið fyri apopleksi- og afasirakt
MBF-húsið, Landavegur 10, Tórshavn, Tlf. 321520

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL ASCONA
Er í góðum standi, til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 250832

TIL SØLU
Einar 17" OZ felgur við dekkum til sølu.
Tlf. 210346

TIL SØLU
Svartur Peugeot 2.0 LX, 135 hk, árg. nov. 99, koyrt 13.000 km, í sera góðum standi, til sølu.
Tlf. 252631 - 315819

FORD MONDEO 1,8
til sølu.
Tlf. 319800, e. kl. 17

EITT GOTT KEYP
Ein Peugeot Partner 19 D. vøruvognur, árg. 5/2000, koyrt 25.000 km, til sølu vegna keyp av størri bili. Nýprísur 126.000 kr. Stórur avsláttur.
Tlf. 333833 - 221139

PÁHANGARAKRÓKUR
til Rover 600 til sølu.
Tlf. 253973 ella 444378

NISSAN SUNNY ST. CAR
árg. 87, ongar plátur, til sølu fyri uml. 5.000 kr.
Tlf. 224220

VW GOLF
árg. 86, til sølu.
Tlf. 210220

DEKK & FELGUR
Fýra dekk á felgum til Mazda 323 til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 223545

TIL SØLU
Sierra 1.6 Lazer, árg. 03/89, til sølu sum eykalutir. Sierra 2.0 V6, árg. 11/83, krevur ábøtur, til sølu heilur ella sum eykalutir.
Tlf. 446195, e. kl. 19

FORD SIERRA 1,6 CLX
Árg. 87, til sølu.
Tlf. 312488

MAZDA 323
árg. 87, í góðum standi, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 311195

TOYOTA COROLLA
árg. 85, til sølu. Sýnaður í des. 2000.
Tlf. 424219

TIL SØLU
Toyota Corolla, árg. 85, til sølu fyri 5.000 kr. Bilurin hevur koyrt 130.000 km. Ábøtur krevjast.
Tlf. 424219

CITROËN XANTIA 1,9 TD
árg. 12/96, koyrt 99.000 km, til sølu.
Tlf. 322117

TIL SØLU
Saab 900i, typa YA, hvítur, árg. 85.
Tlf. 319418 - 219418

PEUGEOT 306
árg. 86, nýsýnaður, til sølu fyri 4000 krónur.
Tlf. 250965 - 457621

SPORTSFELGUR
15" sportsfelgur við nýggjum dekkum til sølu. Til Peugeot.
Tlf. 210346

AUDI A4 1,6
árg. 96, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 223198

TIL SØLU
Fýra Good Year dekk, 185/70 R x 14, so gott sum nýggj, til sølu fyri 500 kr. stk. Nýprísur 995 kr.
Tlf. 256764

FORD FIESTA
Árg. 89, biliga til sølu.
Tlf. 218149

OPEL ASCONA 16
diesel, til sølu fyri 12.000 kr. Árg. 86, nýsýnaður og er í góðum standi.
Tlf. 421142 ella 221184

MITSUBISHI PICK-UP L200
4 WD, í sera góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 282511

TIL SØLU
Toyota Hilux diesel, árg. 85, í góðum standi, til sølu fyri 18.000 kr. Er nýsýnaður.
Tlf. 441280

TOYOTA CAMRY 2,0 GLi
árg. 86, til sølu sum eykalutir fyri 3.000 kr. Motorurin er farin.
Tlf. 222059

Ford Escort Diesel !
Ein Ford Escort 1,9 St.car, árg. 92, aul-felgur. Biliguv bilur kann takast í býti.
Tlf. 221311

TOYOTA LANDCRUISER
árg. 85, nýsýnaður og í góðum standi.
Tlf. 250133 og 449005

HVÍTUR MAZDA 626 GTI
árg. 87, 4 hjólsstýring, fartpilot, elsóltak, el-rútar, el-spegl og nýtt anlegg við cd. Í góðum standi.
Tlf. 319954

VW GOLF 1,6
Árg. 91, 5 H, til sølu fyri 29.800 kr. Sp/f Auto ImportBilasøla - eykalutir
Tlf. 421560 - 217778

TIL SØLU
Óbrúktur kølari til Ford Orion.
Tlf. 253942 / 443352

4 SPORTSFELGUR
við dekkum, 195/50 R 15 til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 445165

FORD SCORPIO GA
árg. 86, sýnaður í sept. 2000, koyrir ikki, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 256399

MAZDA 323
árg. 85, nýsýnaður, krevur ábøtur, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 218664

YNSKIST
Bilur til 7-9 persónar ynskist til keyps.
Tlf. 317865 - 224910

FORD FIESTA 1,1
til sølu. Góður til eykalutir, hevur alu-felgur við nýggjum dekkum + anhangari, gjørdur úr einum Fiesta.
Tlf. 315713, e. kl. 17

AUDI TIL SØLU
Ein Audi 80 til sølu. Hevur 2000 motor, 115 hestar, sær sera gott út, ongin rustur.
Tlf. 314175

OPEL CORSA
til sølu. Sær gott út.
Tlf. 317317

TIL SØLU
Opel Senator 3.0i, árg. 86, Omega motorur 94, 235 hk, hevur koyrt uml. 110.000 km.
Tlf. 223125

TIL SØLU
Ford Fiesta 1,3, árg. 08/94, koyrt uml. 62.500 km, sýnaður 04/2001, í góðum standi.
Tlf. 316279, e. kl. 17

TIL SØLU
BMW 318 tds Compact, árg. 04/96, 44.200 km, 16" alu-felgur og cd-spælara. Við fylgir eitt sett av stálfelgum. Sera væl hildin.
Tlf. 223023 ella 224509

CAMPINGVOGNUR
Vælhildin TEC campingvognur til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 311830 / 211830 e. kl. 16

NISSAN PATROL
av stutta modellinum, er hækkaður við stórum dekkum, til sølu.
Tlf. 213676 & 373686

TIL SØLU
Ein VW Passat Tdi (115 hk), árg. 2/2000, hevur el-rútar, el-spegl v/hita, 15" sportsfelgur, antispinn, spoylara o.m.a. Nýprísur 270.000 kr. Áhugað ringið á
Tlf. 333037 - 213737

TIL SØLU
Nýsýnaður Ford Orion til sølu.
Tlf. 222806, e. kl. 18

MAZDA 626 LX 2000
frá 87, sýnaður í 2000, til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 253782

TIL SØLU
Ford Escort 1.6 Savoy, árg. 89. Hevur skaða á vinstru síðu, annars nýsýnaður, biliga til sølu.
Tlf. 456408

Amboð

DREYGUBONKUR
til træ, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 220941 - 447041, e. kl. 17

TIL SØLU
Brúktar Tekko forskallingar eru á goymslu. Ymisk forskallingsútgerð. Kaj Andreasen & CO
Tlf. 315600

BMW 325 TD
árg. 7/94, uml. 150.000 km, sýnaður 5/5-01, svartur, nógva eykaútgerð, sportsfelgur + fýra eyka felgur. Er í sera góðum standi. Kostnaður 149.000 kr.
Tlf. 213509

YNSKIST
Spreingimáttur ynskjast til keyps.
Tlf. 216600

Arbeiði

HON & HANN
Søkt verður eftir dagligum leiðara til Hon & Hann. Tú fært ábyrgd av dagliga arbeiðinum, at keypa inn og vera við á messu. Umsóknin skal sendast til: Hon & Hann, N. Finsensgøta 10,
110 Tórshavn

REINGERÐARHJÁLP SØKIST
Genta ella kona søkist til reingerð 3 tímar um vikuna.
Tlf. 223239

REINGERÐ
Fólk søkist til reingerð í privatum húsi 2 tímar aðru hvørja viku.
Tlf. 317234

TILBOÐ YNSKIST
uppá pussing av eini trappu við og uttan flísar.
Tlf. 312069

FRÍTÍÐARARBEIÐI
Søkt verður eftir fólki í Danmark, ið eru áhugað at gerast sjálvstøðug (distributørar). Frættið nærri – ringið til Petur
+45 22615362 / +45 32844458

Barnaansing

GENTA/KONA SØKIST
at heinta Tino, 2 ár, úr dagpleygu og ansa eftir honum, til eg komi heim frá arbeiði.
Tlf. 317770

Barnaútgerð

BILSTÓLUR
til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 313989

TIL SØLU
Svartur Silver Cross barnavognur og bláur Brio koyristólur.
Tlf. 310774

BARNAVOGNUR
2 ára gamal, myrkabláur barnavognur til sølu fyri 1200 kr. Babylift, dýna og koddi fylgja við.
Tlf. 318747 eftir kl. 18.00

BILSTÓLUR
Lítið brúktur, 1 ára gamal , góðkendur Britax bilstólur, 0-13 kg, til sølu.
Tlf. 311688

YNSKIST
Trip-trap stólur ynskist til keyps.
Tlf. 333028 - 212499

YNSKIST
Combivognur í góðum standi ynskist til keyps fyri sámiligan prís.
Tlf. 319428, e. kl. 17

Bátaútgerð

BÁTUR TIL SØLU
Glastrevjabátur - 5 m langur við Johnson 25 hk páhengara og vogni til sølu.
Tlf. 318657 og 311038

TIL SØLU
Brúktur Volvo Penta motorur TAMD 60C 177 hk. og Twin Disc gear v/ slireventil typa MG 506-1 biliga til sølu.
Tlf. 287726

TIL SØLU
Tveir 4,8 metrar langir glasfipur bjargingarbátar til sølu.
Tlf. 218116

Bingo

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 20. mai kl. 16.00. Høvuðsvinningur á lutaseðli ein vikuskiftis flogferð. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kyndil

GOTT STEVNUBINGO
verður á Strondum hósdagin 24. mai (Kr. himmalferðardag) kl. 18.
Strálan & StIF

SUÐUROYINGAR!
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 28. mai kl. 19. Høvuðsvinningur á lutaseðli: Harmonikuferð fyri tvey við Norrønu.
Tvøroyrar Svimjifelag

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum onsdagin 23. mai kl. 19.00. Høvuðsvinningur Apex ferðaseðil Føroyar-Danmark. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

BÁRU-BINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsunum og í sølubúðum um alt landið. Tú sært beinanvegin um tú hevur vunnið. Bygdarfelagið Báran
í Árnafirði

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Pálsstovu hvørt mikukvøld kl. 19.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. tvey gávukort á 500 kr. og ein vikuskiftisflogferð. Eisini verða tvey eykaspøl. Koyring heim.
Stuðlafelagið Glottin

Bøkur

BØKUR TIL SØLU
Uml. 50 bind »Sket« (Vort århundredes historie), alt í ringbindum. 90 Bestsellers frá »Den danske bogsamler klub«. Alt biliga til sølu.
Tlf. 321915 - 220660

BØKUR TIL SØLU
Hugo Krantz og Ludvig Johansen, 10 bind. Thawing & Appel forlag, 7 bind.
Tlf. 321915 - 220660

BØKUR TIL SØLU
Ymiskir ríthøvundar týddir til danskt: Samleren bogklub, 16 bind. Gyldendal forlag, 41 bind. Steen Hasselbachs forlag, 16 bind.
Tlf. 321915 / 220660

Býli

ÍBÚÐ ELLA LÍTIL HÚS YNSKI
Tilkomin kvinna søkir eftir íbúð ella lítlum húsu við trimum kørnrum til leigu í høvuðsstaðnum.
Tlf. 313428

ÍBÚÐ Á AMAGER
til leigu frá 28. mai til 15. juli. Kostnaður 1.000 kr. um vikuna.
Tlf. 24940263

TIL SØLU
Nýístandgjørt hús úti á Stongum í Sørvági til sølu. Grundøkið 1176 fermetrar, og eitt dyrkað jarðarstykki, 1151 fermetrar, til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 371083 ella 250575

HÚS Í VÁGI
Eldri hús í Vági til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 317473

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Tvær gentur, onnur hevur eitt barn, ynskja íbúð til leigu skjótast gjørligt. Eru friðarligar og fara væl um.
Tlf. 220296, 328144, Eva og Arna

KAMAR YNSKIST
Ungur maður søkir kamar til leigu í Havn skjótast gjørligt. Er friðarligur, roykir og drekkur ikki og fer væl um.
Tlf. 223040

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
ynskist til leigu í Havn beinanvegin. Eri 25 ára gamal og havi fasta inntøku.
Tlf. 251780

ÍBÚÐ YNSKIST
Par søkir eftir íbúð í Havn fyri max. 4.000 kr. um mar. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 455219

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
»Andelslejlighed« - 2-3 verilsir, ynskist til keyps.
Tlf. 313456 - 211434

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Fuglafirði ella Norðragøtu til par við tveimum børnum.
Tlf. 444567 ella 454311

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
Tvey vaksin við tveimum børnum søkja eftir húsum ella íbúð til leigu í Argjum ella í Havn.
Tlf. 315339

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð ella hús til leigu í sunnara parti av

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki